# Müllersfólkið í Smiðjuni

**Í Smiðjuni í Lítluvík verða eyguni í hesum døgum vend móti Müllersfólkunum í Havn og teirra virksemi innan føroyskt vinnulív. Talan er um framsýning, ið ikki bert vísir søguna hjá eini familju, men eisini lýsir føroyskt vinnulív.**

FRAMSÝNING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Jón í Haraldstovu og Erland Viberg Joensen greiða frá um Müllersfólkini*

Tórshavnar býarsavn skipar aftur í ár fyri søguligari framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hesaferð eru eyguni vend móti Müllersfólkunum í Havn. Ætlanin var upprunaliga at gera eina framsýning um Ebbu Zahle Müller, ið eisini var nevnd Frúan ella Frú Müller, greiðir stud. mag. Jón í Haraldsstovu frá. Jón og Erland Viberg Joensen eru í Smiðjuni í upplatingartíðini, og greiða fólki frá um framsýningina.

Tá tað gjørdist greitt, at tað var trupult at skjalfesta Frú Müller, var farið undir at skriva um Müllersfólkið í Havn. Lagt verður fyri við H.C. Müller, ið var tann í Müllersættini, ið upprunaliga fekk ábyrgdina av DFDS. Ein ábyrgd í sonurin Søren Emil Müller arvaði, og sum sonurin H.C. Müller yngri arvaði eftir honum. Frú Müller var einkjan eftir H.C. yngra. H.C. yngri doyði ungur frá konu og tveimum synum. Ebba Zahle Müller var einans 34 ár, tá hon tók yvir virksemið hjá manninum.

Einkjan, ið var donsk, gjørdist víðagitin sum stjóri reiðari og arbeiðsgevari. Men í Havn var hon eisini kend fyri sítt stóra vælgerandi arbeiði í felagsskapinum Asylforeningen, har kvinnur í Havn royndu at hjálpa, har tørvur var hjá fólki í býnum. Ebba Zahle Müller sat bæði sum nevndarlimur í Reiðarafelagnum og eitt skiftið sum formaður. Hon var virkisfús og tyktist at hava sera gott vinnuskil, t.d. seldi hon sluppirnar beint eftir kríggið, tí hon var greið yvir, at hesin fiskiskapur ikki hevði nakra framtíð, greiðir Jón í Haraldsstovu frá.

Framsýningin vísir umframt virksemið hjá Hans Christopher Müller, Søren Emil Müller og hjúnum Hans Christopher og Ebbu Müller, eisini søguna hjá Müllerspakkhúsi. Søren Emil Müller lat byggja pakkhúsið, ið nú eru mentanarhús. Pakkhúsini vóru miðdepil fyri virksemið hjá DFDS í Føroyum. Á framsýningini eru bæði umsókn um byggiloyvið, fraktbøkur og gamlar myndir, eins og nýggjar myndir av søguligum slóðum í húsunum.

Framsýningin er sera áhugaverd og lýsir søguna hjá einum av mest sjónligu ættunum í føroyskari vinnulívssøgu í 19. og 20. øld. Framsýningin er opin kl. 15-20 hvønn dag fram til 6. august.



Umsókn í 1896 at byggja pakkhús

Stutt áðrenn H.C. Müller doyði søkti versonurin Jens Olsen fyri H.C. at byggja *Müllers pakkhús.*

*Th.B.. JNº 49/1896*
*Herved tillader undertegnede om Tilladelse til at nedrive mit Nøst ved "Hallaklet" og paa samme Grund samt paa den mig tilhørende Grund søndenfor og østenfor Nøstet, at opføre en Pakhusbygning, med Facade mod Søen, ventelig 28 Alen lang og 20 Alen bred.*

Thorshavn den 18de Decbr. 1896.
Ærbødigst for H.C. Müller.
Jens Olsen

*Bygningskommissionen tillader sig tjenesteligt at indstille til Amtets Approbation, at foranstaaende Andragende bevilges paa den Betingelse, at Pakhuset opføres i den befalede Afstand fra de omliggende Bygninger samt at dets Facade mod Søen bliver parallel med Hospitalets Facade og endelig at Bygningskommissionens Medlemmer O. Mortensen og H.A. Hansen føre Tilsyn med Bygningens Opførelse.*
Thorshavns Bygningskommission, d. 8. Januar 1897.
Indstillingen approberes. –
Færø Amt den 12. Januar 1897.

Føroya Landsskjalasavn
Tórshavnar kommuna – Bygningskommisionssager 1896–1902 (50.4–3)

*Umsóknin um byggiloyvi til Müllers Pakkhús er millum tey áhugaverdu skjølini, ið verða sýnd fram*

# Summarfestivalurin betrar tjaldinginarmøguleikarnar

**Í ár verða umstøðurnar at tjalda á Summarfestivalinum betraðar munandi m.a. verður busssamband millum tjaldingarøkið og festivaløkið**

SUMMARFESTIVALUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Í ár verður ikki bert tjaldingarøkið úti í Grøv nýtt á Summarfestivalinum. Pláss eru útvegað til fleiri húsvagnar afturat teimum 15, ið kunnu standa úti í Grøv. Norðan fyri Tekniska skúla verða pláss fyri einum 25-30 húsvagnum – umframt at Kunningarstovan arbeiðir við at finna eitt betri hóskandi tjaldpláss afturat tí, ið er úti í Grøv.

Í fjør var partur av tjaldøkinum ov bratt, og tískil arbeiða vit við at finna aðrar hóskandi møguleikar, verður sagt av Norðoya Kunningarstovu. Ætlanin er somuleiðis at býta tjaldøkini sundur, soleiðis at barnafamiljurnar kunnu vera fyri seg.

Norðoya Kunningarstova hevur ábyrgdina av tjaldøkjunum. Sostatt hevur Summarfestivalurin sjálvur onki við tað at gera. Tað lættir sera nógv um hjá okkum, at Norðoya Kunningarstova umsitur tjaldingina, sigur Steintór Rasmussen.

Eins og í fjør fer Ansni at hava vaktir á tjaldingarøkjunum. Av Kunningarstovuni verður sagt, at vaktarhaldið verður á leið tað sama aftur í ár. Tað vil siga, at fleiri vaktir verða á tjaldingarøkinum frá fríggjadegi klokkan 16 til festivalgestirnir eru farnir av aftur økinum.

Í fjør hildu summi, at teinurin millum tjaldingarøkið og festivalplássið var heldur langur at ganga, tí hava fyrireikararnir í ár valt at seta buss at røkja farleiðina. Bussur koyrir millum tjaldingarøkið og festivalplássið hvønn tíma

# Beinta av Reyni í Bredgade Kunsthandel



**Unga føroyska listakvinnan Beinta av Reyni vísir í august fram málningar sínar í Bredgade Kunsthandel**

MENTAN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tríggjar vikur frá og við 4. august verður framsýningin Håndplukket í Bredgade Kunsthandel í Keypmannahavn. Millum tey fýra ungu listafólkini, ið hesin háttvirdi listahandil leggur vegg til, er Beinta av Reyni.

Unga føroyska listakvinnan við tí listarliga eftirnavninum er somikið spennandi, at hon, saman við Anne-Mette Jørgensen, Frodo Mikkelsen og Ina Rosing, er vald út í stóru rúgvuni av ungum listafólkum, ið royna seg innan danska málningalistapallin.

Á heimasíðu síni skrivar Bredgade Kunsthandel m.a um Beintu av Reyni, at hennara tekniskt gjøgnumarbeiddu listaverk vekja ans. Litirnir og skipanin gera, at tey virka sterk í eygunum á fólki. Hennara nýtsla av ornamentikki er næstan hypnotiserandi. Tú fært eina kenslu av, at tú ert bæði innaní og uttanfyri motivheimin í myndini, við hesum avbjóðar Beinta sambært Bredgade Kunsthandel, tann klassiska naturalistiska málningin, við eini meira modernaðari myndaáskoðan.

Beinta av Reyni hevur seinastu árini sýnt fram bæði einsamøll og saman við øðrum í Føroyum og kring Danmark.